# SETUR FØROYA




**Føroya Læraraskúli:**

## Lærara-útbúgvingin

Læraraútbúgvingin tekur 4 ár og er í tveimum stigum.
Fyrri partur er 3 ára útbúgving á bachelorstøði. Dentur verður lagdur á, at tey lesandi fáa eitt gott fakligt grundarlag í lærarayrkinum, t.d. at skilja grundleggjandi tættir í ástøðiligum arbeiðisháttum, læra virðini, lærarayrkið byggir á, nema sær ta frálæruligu, námsfrøðiligu og sálarfrøðiligu vitan og teir førleikar, lærarin hevur brúk fyri og savna hugan um ta breiðu fakligu vitanina, ið krevst at undirvísa í annaðhvørt hug- ella náttúrvísindaligu lærugreinunum
Triðja árið verður fyrra linjan lisin. Linjulestur er miðvís bóklig og praktisk fyrireiking til at undirvísa í einari av lærugreinum fólkaskúlans.
Bachelor uppgáva verður eisini skrivað hetta árið.
Annar partur - fjórða árið - er yrkisrættað. Onnur linjan verður lisin, og tey lesandi fyrireika seg til lærarayrkið.
Starvslæran er týdningarmikil liður í útbúgvingwni.
Upptøkutreyt er prógv frá miðnámsskúla, ella annar skúli ella royndir.
Førleikakrøvini hjá hesum umsøkjarum verða mett í hvørjum føri sær.
Lestrarbyrjan er august 2011



**Føroya Læraraskúli:**

## Námsfrøði

Námsfrøðingaútbúgvingin tekur 4 ár og er í tveimum stigum.
Fyrri partur er 3 ára útbúgving á bachelorstøði. Dentur verður lagdur á, at tey lesandi fáa gott fakligt grundarlag í námsfrøði, t.d. at skilja grundleggjandi tættir í ástøðiligum arbeiðisháttum, læra virðini, námsfrøðingayrkið byggir á og nema sær ta námsfrøðiligu og sálarfrøðiligu vitan og teir førleikar, ein námsfrøðingur brúkar í gerandisdegnum.
Triðja árið savna tey lesandi seg um eitt ávíst námsfrøðiligt øki, og bachelor uppgáva verður skrivað. Annar partur - fjórða árið - er eitt yrkisrættað ár. Tey lesandi fyrireika seg til námsfrøðingayrki.
Starvslæran er týdningarmikil liður í útbúgvingini.
Upptøkutreyt er prógv frá miðnámsskúla, ella annar skúli ella royndir.
Førleikakrøvini hjá hesum umsøkjarum verða mett í hvørjum føri sær.
Lestrarbyrjan er august 2011




**Søgu- og samfelagsdeildin:**

## Søgu- og samfelagsvísindi

Á Søgu- og samfelagsdeildini vóru á heysti í 2010 tikin inn lesandi á tríggjar bachelorútbúgvingar, hetta í søgu, stjórnmálafrøði og samfelagsvísindi.
Nýggj lesandi verða hereftir ætlandi tikin upp á hvørjum ári, men leisturin verður umskipaður nakað. Í 2011 verða sostatt lesandi bert tikin upp innan søgu- og samfelagsvísind. Lesturin er skipaður við tveimum støðisárum, sum fyri ein stóran part eru felags fyri øll lesandi, og einum serstøkum triðja bachelorári, har lesandi velja breytir í antin søgu ella samfelagsvísindi.
Í løtuni eru ongar masterútbúgvingar bjóðaðar út, men arbeitt verður við hesum. BA útbúgvingararnar gera tað tó møguligt at taka víðari lestur aðrastaðni.
Upptøkutreyt er miðnámsprógv ella samsvarandi útbúgving.

## Stakskeið

Á Søgu- og samfelagsdeildini verða eisini fleiri stakskeið í t.d. løgfrøði bjóða út sum eftirútbúgving.



## Alment skeið í føroyskum

Tað ber til at taka eitt styttri próvskeið í føroyskum. Skeiðið er fyri øll. Skeiðið økir um førleikarnar í føroyskum bæði viðvíkjandi arbeiði, gerandislívi og hægri lestri. Dentur verður lagdur á málløru og nógvar praktiskar venjingar styðja tað, sum gjøgnumgingið verður. Eisini verða ymsir tekstir tiknir fram, sum skulu lesast, greinast og tulkast. Undirvíst verður í 18 vikur og kostnaðurin er kr. 2.800,00 + próvtøkugjald á kr. 700,00. Skeiðsbyrjan er 26.09.2011.



## Journalistisk eftirútbúgving

Journalistiska eftirútbúgvingin verður bjóðað út umvegis Danmarks Medie- og Journalisthøjskole. Eftirútbúgvingin er ætlað føroyingum, sum arbeiða í miðlunum ella við samskifti. Undirvísingin, sum fer fram á Fróðskaparsetrinum og á netinum, er á donskum, men útgangsstøðið er í føroyskum samfelagshøpi

Innihaldið í pørtunum er frá journalistútbúgvingini í Danmark. Nakrir partar verða bodnir í senn, og kunnu setast saman til eina heila diplomútbúgving.
**Upptøkukrav:**
Miðnámsprógv ella samsvarandi útbúgving/ royndir.
les meiri á: http://www.update.dk/foroya